## Sct. Brigid Blond frá Føroya Bjór

Sct. Brigid Blond er tann fjórða bjórin í røðini av Sct. Brigid seriuni frá Føroya Bjór. Bara ein heilt avmarkað møgd er bryggjað av hesum slagnum. Sct. Brigid Blond, er bryggjað úr besta tilfari, eftir Belgiskum íblástri við hveiti og byggmalti. Bert eitt vet av allarbestu humlu er tilsett,umframt natúr kryddaríir og føroyskar hvannir. Blond hevur somu styrki sum GULL: 5,8%. Bjórin er ófiltrerað, og er tískil óklár við ger í. Blond er bryggjað við eini serligari hveiti ger, ið gevur tann eyðkenda fríska smakkin sum hveiti øl hava. Blond smakkar best ísakøld og riggar eisini væl við eini Citrón skivu í ella blandað við SISU, helvt um helvt. Blond riggar væl afturvið fiski, fugli og annars ljósari kjøti.




# Nú fáa føroyingar hita




**Talan er um hol, ið eru boraði í fimm støðum í Føroyum. Skipanin tekur hita úr berginum. Orkukeldan er enn á royndarstøði í Føroyum, men norðmenn og sviar hava havt góð úrslit at vísa á. Jarðfeingi skal næstu tíðina kanna, hvussu væl henda kelda til hita, kann nýtast í Føroyum**

VARANDI ORKA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Frá junimánaði eru holini boraði. Talan er um yvir tíggju hol, harav seks veita hita til Jarðfeingi. Hini eru spreidd kring landið. Tey eru á keiini í Havn, hjá tannlæknanum á Óðinshædd, á Tvøroyri og í Sandavági. Talan er um bæði virkisbygningar og sethús.

- Vit byrjaðu at leita eftir figging fyri seks árum síðani, men oljan hevur verið ov bílig, og tí fingu vit ikki nóg mikið av figging fyrr enn í ár. Síðani í junimánaði hava vit borað holini, og nú er skipanin í gongd allastaðni, har hon er sett upp, sigur Petur Egholm, ið hevur gjørt arbeiðið við berghitanum.

Nú er arbeiðið komið so mikið langt, at kannast skal, hvussu væl tað ber til at taka hita úr berginum í Føroyum í mun til onnur lond.

- Í Noreg og Svøríki hava teir heilt góðar royndir av hesum skipanum gjøgnum 20 ár. Her heima skal Jarðfeingi í samstarvi við eitt danskt universitet kanna hvussu væl berghiti riggar, úrslitini verða løgd út á heimasíðuna hjá Jarðfeingi so hvørt, men tað gevur nokk ikki heilt tað sama í Føroyum, sum í londunum kring okkum. Tó eri eg fullvísur í, at tað ber til at nýta berghita í Føroyum, greiðir Petur Egholm frá.

### Ein kostnaðarmikil íløga

Ofta er ein trupulleiki við grønari orku, at hon kostar so nógv í mun til oljuna, og soleiðis er í fyrsta umfari eisini við berghita.

- Tað er ongin loyna, at berghiti kostar at seta upp. Holið er vanliga 200 metrar djúpt og tað kostar umleið

## Týdningarmest er at vera tilvitað

**Hóast berghiti er ein góður møguleiki at minka um útlátið, metir Petur Egholm ikki, at tað er tað fyrsta í má gerast.**

**- Fyrst og fremst mugu fólk gerast meira tilvitað um sína orkunýtslu, soleiðis kunnu fólk spakuliga finna fram til, hvussu nógvari orku tey í veruleikanum hava tørv á. Eftir tað kunnu tey so fara í gongd við at nýta varandi orku. Soleiðis slepst í stóran mun undan at fólk troyta orkuna, ið er í Heiminum. Harumframt ber bara til at hava umleið eitt hol til berghita á hvørum grundstykki, tí meira orka er ikki í berginum, soleiðis at hon kann endurnýggja seg, fortelur Petur Egholm.**

**Eitt annað, ið harmar Petur Egholm er, at eldri fólk sita í húsum, sum eru alt ov stór til teirra.**

**- Tey hita eini heili hús, ið tey bara nýta ein brotpart av. Um tey ikki flyta mugu tey gera okkurt, har tey býta húsini upp, so tey bert nýta ta orku tey hava tørv ár**

**- Tað eru eisini dømir um fólk, ið hava húsalán í yvir 30 ár, og tí haldi eg, at bankarnir burdu hjálpt til at fáa gongd á nýtsluna av grønari orku. Bankarnir kundu givið orkulán, so at fólk kundu fingið ráð til vegleiðing og møguleika at koma í gongd við grønari orku. Á hesum økinum eru londini kring okkum 20 ár framman fyri okkum, sigur Petur Egholm.**